§ 15. Ásetingar fyri øki G2: Neysta- og vinnuøki við serstakari byggisamtykt.

1. Økið verður lagt av til neysta- og vinnubygging, ið hóskar til umhvørvi, har byggingin fer fram. Umhvørvisflokking er til lættari vinnu í umhvørvisflokki 1 og 2.

2. Neyst mugu ikki verða bygd í meira enn einari hædd við nýttum lofti og ikki verða hægri enn 7m til mønuna, mált frá miðaljørðildi (miðal við húsahornini).

3. Bygdaráðið kann tó víkja frá hesum ásetingum, um serlig byggiætlan verður gjørd fyri alt ella stóran samanhangandi part av neysta-vinnuøkinum.

4. Við eini serstakari byggisamtykt fyri alt økið, kann byggjast í tveimum hæddum við nýttum lofti og byggingin verða 10 metrar høg.

5. Neystaøkið G2 í Syðrugøtu er frá 03.11.2015 umfatað av eini Serstakari Byggisamtykt, og undiruppdeilt í 3 øki, sum víst í kortskjali fyri G2 í Syðrugøtu og í teksti her niðanfyri:

Øki 1, verður varðveitt sum verandi neystabygging.
Øki 2 kann verða í mesta lagið 7 metur høg bygging, ið hóskar til neystaumhvørvið í Syðrugøtu.
Øki 3 kann verða í mesta lagið 10 metur høg bygging, ið hóskar til neystaumhvørvið í Syðrugøtu.

Grundøkini, ið eru umfataði av hesi Serstøku Byggisamtykt eru: Matriklar fyri Øki 1: 114a, 265, 141, 69, 266, 34, 151, 104a, 166, 51.
Matriklar fyri Øki 2: 193, 267, 122, 132, 28, 2, 139, 3b, 268, 183, 125, 269.
Øki 3 inniheldur bert matrikul nr. 29.